# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



29. september fingu Elin Djurhuus Joensen, Tórshavn, og Finn Bjarni Hentze Samuelsen, Tórshavn, búsitandi í Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 3680 gr. og var 53 cm. langur.

24. september fingu Inga Greve Klemensen og Janus Kampmann Vestmanna, búsitandi á Fredriksberg ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4695 gr.

1. oktober fingu Daysie og Róðin Thomsen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2900 gr.

2. oktober fingu Helena Sigurðsdóttir og Mats Jørgensen, Århus, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3100 gr.

2. oktober fingu Ragnhild Bisp Poulsen og Hjalmar Poulsen, Sandavágur, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 2950 gr.

3. oktober fingu Hildigerð og Pól á Sondum, Saltnes, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3485 gr.

4. oktober fingu Olevina Egilstoft og Rolf Herup Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3200 gr.

6. oktober fingu Torgerð Joensen og Johnny Vestergaard, Skopun, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2900 gr.

7. oktober fingu Tóra Nolsøe Olsen og Tórhallur Eliassen, Gøtugjógv, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3825 gr.

8. oktober fingu Eyðbjørg og Poul Henning Jacobsen, Saltangará, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4250 gr.

**Brúdleyp**

Leygardagin 11/10-08 kl 16.00 giftast í Vedbæk kirkju Hanna Dalsgarð av Argjum og Christian Korsø Jensen úr Vedbæk. Brúdleypið verður hildið innbodnum á Mikkelgaard Rungsted Strand 211. 2950 Rungsted.

Leygardagin 11. oktober kl. 15.00 giftast í Havnar Kirkju, Miriam Magnussen, úr Miðvági og Høgni Johannesen, Tórshavn.

**85 ára føðingardagur**

Í dag (10.10.08) fyllir Magnus Pauli Johannesen í Vestmanna 85 ár. Hann er burturstaddur.

**75 ára føðingardagur**

Í dag 10. oktober fylla tvíburarnir Margit Hansen og Katrin Samuelsen 75 ár. Dagurin verður hildin saman við næstringum á Gjáargarði.

**70 ára føðingardagur**

Í dag, 10. oktobur fyllir Maria Danielsen, Skúlagøtu 4, Tórshavn, følld Johannesen, ættað av Oyrabakka, 70 ár. Hon er burturstødd føðingardagin.

Í dag, 10. oktober verður John Oluf Jacobsen, Glyvrar 70 ár. Føðingardagurin verður hildin heima leygardagin 11. okt. frá kl. 18, øll eru vælkomin.



Robert á Lakjuni Fuglafjørður, verður 80 ár 14. oktober 08. Føðingardagurin verður hildin í Siloa kl. 19.00.



Leygardagin 11. oktober kl. 14 giftast í Býráðshøllini í Klaksvík Beinta Olsen úr Klaksvík og Eyðfinn Jacobsen úr Haraldssundi. Eftir vígsluna verður móttøka, har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitslan verður fyri innboðin á Klaksvíkar Sjómansheimi kl. 18.

## Minningarorð um

# Turið Sólbjørg Olsen

**f. 06.08.1989 – d. 16.08.2008**



Góða Turið!

Vit sakna teg so ómetaliga nógv. Eftir summarfrítíðina fluttu vit í Glyvra skúla, og vit gleddu okkum at síggja teg her úti, men so skuldi ikki vera. Nú er tín stólur tómur, og fyrstu vikurnar á Glyvrum var tað, sum vit bíðaðu eftir, at tú fór at koma. Vit vildu so illa trúgva tí, at vit ongantíð aftur skuldu síggja títt fitta andlit.

Altíð vart tú so smart og fín. Aðrir næmingar, sum plagdu koma og heilsa upp á teg, høvdu mangan á orði: »Turið hevur altíð so flottar negl og er altíð so smart«. Hetta var so satt, sum tað var sagt, og tað gleddi teg.

Tær dámdi so væl tað vakra, sum finst. M.a. var tað tí vorðið ein av tínum »uppgávum« at hjálpa til við at passa urtapottarnar hjá okkum. Tú vart altíð so glað, tá teir fingu nýggjar knubbar og blómur, og tín gleði spreiddi gleði.

Hetta er bert eitt dømi av mongum um, hvussu tú lærdi eisini okkum at dvølja við løtuna her og nú, at sansa og uppliva.

Tey, sum ikki kendu teg, sóu kanska fyrst títt óhjálpni. Tað gjørdu vit helst eisini ta fyrstu tíðina, tá vit byrjaðu í serstovuni í 2003. Men betri vit komu at kenna teg, meira gleið títt brek í bakgrundina, og fram í myndina trein tín persónleiki.

Tú hevði tínar egnu meiningar og gavst til kennar, um tú vart ónøgd við eitthvørt. Tað var tær ikki líkamikið, hvat varð gjørt í skúlanum, og hetta var ein stór styrki hjá tær.

Tú hevði eisini ein sera góðan humoristiskan sans og kundi flenna og "klukka", so tárini trillaðu niður eftir kjálkunum. Serliga um onkur okkara av óvart stoytti okkurt ella misti okkurt á gólv, ja, so hevði tú sæð tað, nærum áðrenn vit sjálvi varnaðust tað, og sat í skellilátri.

Einaferð høvdu vit latið ein næming í jakka og vóru klár at fara við honum út í bussin. Men vit skiltu ikki, hví tú sat og flenti og flenti. Tá varnaðust vit, at tað var tín jakki, sum vit høvdu latið næmingin í. Hetta var bert ein av óteljandi løtum, har tín humoristiski sansur lýsti upp.

Eins og flestu menniskju kundi tú eisini vera hugsanarsom og álvarsom. Til tíðir sjálvsagt eisini illa fyri av sjúkuni. Tá dámdi tær væl, at onkur okkara kundi sita við tær og lesa eina bók, spæla okkurt spæl ella bara vera hjá tær.

Góða Turið, vónandi vóru hesar løtur líka ríkar fyri teg, sum fyri okkum. Tú hevði ein ótrúligan stríðsvilja og lívsvilja og lærdi okkum at síggja, at alt er ikki ein sjálvfylgja í lívinum.

Vit fara altíð at minnast tær góðu løturnar saman við tær. Sum tá ið vit settu leikir upp, spældu Krubbuspæl, vóru útferðir, m.a. á Náttúrugripasavninum, sóu ymsar leikir, eitt nú á Lærarskúlanum, og tá vit vóru við í ymsum tiltøkum saman við skúlanum. Nú verður tómligt hjá okkum starvsfólkum og tínum floksfeløgum, tí tú vart altíð við og setti dám á við tínum verumáta.

Tú fert altíð at eiga pláss í hjørtum okkara. Títt fitta bros minnir okkum á sangin »Barnabros«:

*Eg samli upp á barnabros,*
*tey smáu ljósu smíl,*
*og um tú breytst upp hjartað mítt*
*við bori, lykli, fíl –*

*Tú fanst eitt savn av smílum har,*
*sum eingin makan sá,*
*frá túsund smáum brosum bjørt*
*um savnið glæman lá.*

*Og tráddi tú á hjartað mítt*
*og knústi tað sum glar,*
*so hendi bert í somu stund*
*tess veggur brotin var –*

*At barnabros, tey ljósu bros,*
*tey vórðu leys og frí*
*og fyltu meg og fyltu teg*
*við barna gleðisríð.*

*Tí henti eg mær hvørja ferð*
*tað blóma bros á kinn,*
*eitt lítið bros og leggi tað*
*í hjarta-savnið inn.*

Góðu Sonja, Jonhard, Piddi, Oddny, Rebekka og Tóra. Vit hugsa um tykkum í stóru sorg tykkara og vilja fegin takka tykkum fyri tíðina saman við Turið, og at vit fingu høvi at siga henni farvæl. Má Harrin styrkja okkum øll í sorgini.

Vit vilja við hesum orðum lýsa frið yvir minnið um Turið.

**Starvsfólk og næmingar**
**í serstovuni í Glyvra skúla**

**Dagurin**

**11. oktober. Nikatius.** Grikki, sum í 2. øld boðaði evangeliið í Suðurfraklandi og stovnaði kirkjulið og saman við øðrum og bygdi kirkjur m.a. í Lyon. Hann og ein av monnum hansara, Probus, sum eisini hevur staðið í álmanakkanum, vóru tiknir av døgum av uppøstum heidningum. Nólsoyar Páll varð doyptur hendan dagin í 1766.

**12. oktober. Maximilianus**, deyður umleið ár 285. Pávin Sixtus II sendi hann sum trúboðara til tað, sum nú verður rópt Eysturríki. Hann varð seinni biskupur, men bleiv tikin av døgum. Er verndarhalgimenni hjá Eysturríki, og fleiri av keisarunum har hava borið navnið Maximilian. Navnið merkir hin fjølmenti.

**13. oktober. Angelus**. Fleiri halgimenni bera hetta navn, sum er latínskt og merkir eingil, tað er sendiboð.